Eg gangi runt í býnum sum eitt ólukkudýr
Í skrellispannini er bert papír
Eg kenni ikki pápa mín eg veit hann eitur Per
Eg veit heldur ikki hvør mamma mín er
Eg eri ein hundur og eg eiti Snar
Góðu tit øll hjálpið nú mær
Eg havi ongan partnara eg veit ikki hví
Eg leiti eftir mati og tað er eitt stríð
Vov vov vov vov vov vov vov vov
Vov vov vov vov vov vov vov

Tað kemur ein maður og tekur meg við
Koyrir meg í ein stóran bil
Hann startaði motorin og koyrdi avstað
Hvar fara vit kanst tú siga mær tað

Vit fóru inn í eitt hús
har lá ein lítil mús
nógvir hundar og bølamyrkt
tá vit komu inn bleiv tað púra kvirt

Eg bleiv koyrdur inn í eitt búr
aftan fyri ein múr
Nógvir hundar og bøla myrkt
tá vit komu inn bleiv tað púra hvirt

Eg eri ein hundur og eg eiti Snar
Góðu tit øll hjálpið nú mær
Vov vov...